## Siga nei til ES

Skuldu stórtingsvalevnini í Troms gjørt av, um Noeg skal fara upp í ES ella verða verandi uttanfyri, er eingin ivi um úrslitið. Av teimum 17 valevnunum siga 13 nei til ES-limaskap, tvey siga ja, og tvey vilja ikki svara spurninginum. Tað eru valevnini hjá Arbeiðaraflokkinum, sum siga ja ella ikki vilja svara. Framburðsflokkurin er harðliga ímóti at fara upp í ES, og eitt av valevnum floksins sigur, at skal avgerð takast, skal fólkið spyrjast á einari fólkaatkvøðu. Samstundis eru øll valevnini til reiðar at taka undir, at fyrimunir og vansar við ES-limaskapi verða kannaðir.



## Óheppin stavivilla

Í gjár var kanadiski forsætisráðharrin, Stephen Harper, og vitjaði býin Iqaluit, sum er høvuðsstaður í inuittaøkinum har norðuri í landinum. Men tað var ikki sjálv vitjanin, sum fólk hugsaðu mest um, men heldur ein stavivilla, sum embætismenninir hjá forsætisráðharranum høvdu gjørt í ferðaskránni. Orðið Iqaluit merkir "tað góða miðið" ella "plássið við nógvum fiski", men av misgáum høvdu fyrireikararnir stavað býarnavnið Iqualit. Tað var óheppið, tí hetta orðið merkir "plássi við teimum skitnu afturpørtunum" ella "staðið við bremsusporunum" - og her hava bremsuspor einki við bilkoyring at gera.

# Lóg og kunngerð – men ein

**Hóast fiskimenn við broytingum í ALS-skipanini á pappírinum áttu at verið undir eini – fyri teir – betri skipan, ótolnast menn eftir pengum úr skipanini**

FISKIMENN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun var ein kvinna inni á gólvinum á Sosialinum og fýltist á, at fiskimenn framvegis ongan pening fáa úr Arbeiðsloysisskipanini, tó at lógin er broytt, og kunngerðin um "útgjald til fiskimenn, tá ið skip verða løgd vegna umvælingar" er lýst í Kunngerðarblaðnum.

Kvinnan vísti á, at hon hevur nært tilknýti til fiskimann, sum onga inntøku hevur havt síðan í vár, tí skipið, hann var við, alla hesa tíð hevur verið til umvælingar.

- Nú broytingar eru framdar í lógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, kundu vit vænta, at fiskimenn vóru komnir undir betri umstøður í skipanini. Teir gjalda jú inn í ALS-skipanina, men í gjøgnum øll hesi ár, síðan skipanin varð sett í verk, hevur verið sera trupult hjá teimum at fingið nakað úr skipanini aftur, tá ástendur.

Kvinnan hevði kunngerðina, sum fevnir um broytingarnar, í hondini, nú hon kom inn á gólvið.

- Kunngerðin er lýst hin 20. juli í ár – ella fyri júst einum mánaði síðan, men lógin, sum fevnir um hesar broytingar, er frá 25. mai í 2009.

Hon sigur, at tó at menn hava verið hjá ALS, hava fylt út umsóknarbløð og hava havt váttan við sær, sum sigur, at teir onga inntøku hava havt, tí skipið er til umvælingar, so er eingin peningur komin kortini.

- Hjá ALS hava tey áður víst á, at neyðugt var við lógarbroyting, og tá lógarbroytingin var samtykt í mai, vístu tey á, at eingin kunngerð var á økinum. Men nú hevur ALS bæði lógina og kunngerðina, sum Jóhan Dahl, landsstýrismaður, hevur undirskrivað.

### Veita tænastu

Kvinnan sigur, at hon eisini hevur verið í samband við Johan Dahl, men hann hevur sagt, at lógarbroytingin er samtykt, eins og kunngerðin er lýst, og tí liggur málið hjá ALS.

- Eg haldi, at fiskimenn so leingi hava verið fyri vanbýti í ALS-skipanini, at tað nú virkuliga er upp á tíðina, at skil kemur á, og at fiskimenn, sum hava rindað sín stóra part til hesa skipan, fáa síni náttúrligu rættindi.

Hon sigur, at ALS eisini hevur víst á, at hetta er feriutíð, men hetta heldur hon ikki nógv um.

- Tey eiga at leggja sær í geyma, at ALS er ein tænasta, sum eigur at virka fyri allar bólkar í skipanini, eisini í summarfrítíðini.

Kvinnan sigur seg vóna, at øll, sum varða av fiskimonnum, ALS og myndugleikar nú taka seg um reigg og lata fiskimenn og teirra familjur fáa tær sømdir, sum hesin samfelagsbólkur hevur uppiborið.



*Hóast fiskimenn sambært lóg hava goldið sín part av ALS-skipanini, síðan skipanin varð sett í gildin í Føroyum, hevur verið trupult hjá teimum at fáa nakað úr skipanini aftur, tá tørvur hevur verið á tí. Nú er lógin broytt, eins og kunngerðin um útgjald til fiskimenn er lýst – og so kortini sær út til at vera trupult hjá fiskimonnum at fáa nakað úr ALS*

*Mynd: Karstin Vang*

# Stórur trolari á eftir gullla



*Ariende er umleið 1500 bruttotons stórur og kemur komandi dagarnar at taka ímóti gulllaksi á Vestmanna*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

**Tíðliga í morgun kom stórur hálendskur trolari á Vestmanna eftir frystum gulllaksi og til at taka ímóti gulllaksi hjá føroyskum ísfiskatrolarum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ariende, sum trolarin eitur, er 90 metrar langur. Hann er komin higar til lands at taka ímóti frystum gulllaksi hjá virkinum Atlantic í Vestmanna, men hann er eisini komin higar til at taka ímóti gulllaksi hjá føroyskum ísfiskatrolarum.

Ein av monnum aftanfyri hesa verkætlan er Tummas Christophersen, reiðari, men hann var ikki til at fáa fatur á, tá vit ringdu til at fregnast í morgun.

Sum skilst á Havnaskrivstovuni í Vestmanna er Ariende umleið 1500 bruttotons stórur.

Sosialurin hevur skilt, at skipið væntandi kemur at liggja á Vestmanna, til skipið hevur fingið fulla last – av frystum og feskum, sum gulllaksaskip veiða.

Síðan er ætlanin, at Ariende fer av landinum við fiskinum og kemur síðan aftur til at fylla lastina einaferð aftrat, áðrenn